*Bjarni Olsen, formaður í Búskaparráðnum ávarar:*

# Oljuvónir loysa ikki dagsins trupulleikar

*-Finst nøkur olja í føroysku undirgrundini, ganga nógv ár, áðrenn føroyski búskapurin fær ágóða av inntøkunum. Eg beri stórliga ótta fyri, at vit fara at gloyma at fyrihalda okkum skilagott til at loysa trupulleikarnar, sum eru í samfelagnum í dag, tí vit halda, at oljan fer at loysa hetta fyri okkum sigur Bjarni Olsen, formaður í Búskaparráðnum. Hann heldur tað vera bæði skeivt og vandamikið at byggja tann komandi politikkin í Føroyum uppá eina oljuinntøku, sum - um hon í heila tikið verður til nakað - liggur langt frammi í tíðini*

*Bjarni Olsen, formaður í Búskaparráðnum: -Eg havi varhugan av, at ein hugburður er við at stinga seg upp, har fólk láta vera við at hugsa skilagott um, hvussu vit loysa dagsins spurningar, tí hetta skulu oljuinntøkurnar nokk klára*

JAN MÜLLER

Bjarni Olsen sigur, at nú so nógv verður tosað um eina komandi oljuvinnu er tað eisini natúrligt, at Búskaparráðið kunnar seg við gongdina í oljumálinum. Fundurin við Oljuráðleggingarnevndina var fyrst og fremst fyri at fáa eina grundleggjandi vitan um hesa nýggju vinnu. Mál, sum vórðu umrødd á fundinum, vóru spurningurin um eina oljulóggávu, hvar oljufeløgini og landið standa í hesum útviklinginum, hvussu komandi skattaskipanin fyri hesa vinnu kann koma at síggja út, hvat virksemi kann koma upp á tal, hvussu vit koma at standa í eini samráðingarstøðu o.s.fr.

Bjarni Olsen leggur dent á, at talan var bara um ein reint kunnandi fund um eitt umráði, sum heilt natúrliga er partur av áhugaøkinum hjá Búskaparráðnum. Fundurin er so ein liður í royndini at skaffa teimum eitt innlit í hetta stóra og nýggja mál.

### Øgilig avbjóðing

Formaðurin í Búskaparráðnum dylur ikki fyri, at her er talan um eina øgiliga avbjóðing fyri Føroyar, har bæði ræðandi tankar men eisini veldugir møguligar stinga seg upp.

-Men nakra fasta mynd av tí, sum vit her í veruleikanum hava við at gera, havi eg ikki sum er. Eg haldi tí, at tað nettup er okkara uppgáva at skaffa eina realistiska fatan av, hvat problematikkurin er í øllum hesum.

Bjarni Olsen vísir m.a. á tey mongu áhugamálini, sum stinga seg upp, tí fólk vilja sleppa at luttaka o.l. Ein spurningur er so eisini, í hvussu stóran mun vit eiga at luttaka.

### Oljuráðstevnan gott tiltak

Formaðurin í Búskaparráðnum, sum eisini er stjóri á Hagdeild Føroya var ein av teimum mongu, sum fylgdu við fyrilestrunum á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum. Hetta gjørdi hann, tí hann frammanundan kendi lítið og einki til hesa vinnu og spurningar knýttar at henni.

-Eg skilti ráðstevnuna sum eina roynd heilt grundleggjandi at greiða frá viðurskiftunum, og fyri mín part kann eg bert siga, at hetta vóru tveir gevandi dagar.

Hvussu sær hann so sjálvur hesa nýggju avbjóðingina - er hon kærkomin ella óynskt?

-Tað er greitt, at hetta er nakað kærkomið, sum kann koma at geva eina inntøku og vælstand í Føroyum, um leitingin eftir olju og gassi í veruleikanum gevur tey úrslit, sum menn ganga og vóna. Men hinvegin mugu vit eisini ásanna, at ein búskaparlig framgongd í einum og hvørjum landi er ikki góð fyri øll í samfelagnum. Ein oljuvinna fer at fáa eina stóra ávirkan, sum ikki verður tann sama í øllum samfelagnum. Hon fer m.a. at ganga út yvir ávís øki.

Til d. vilja tey, sum hava eina ella aðra framleiðslu, verða darvað av teimum kostnaðarhækkingum, sum koma í kjalarvørrinum á einum slíkum útviklingi. Eisini eiga vit at hava í huganum, at her er ikki talan um nakað varandi ævintýr.

### Mugu ikki yvirmeta tydningin longu nú

Bjarni Olsen heldur somuleiðis, at vit eiga ikki at yvirmeta tydningin oljuspurningurin kann fáa fyri okkum komandi árini. Búskaparliga sæð fyri landskassan sjálvan fer tað kanska í fyrsta lagi at fáa nakra veruliga ávirkan eftir ár 2005 ella líknandi. Hetta er eitt ov langt tíðarskeið til, at vit sum føroyingar nú bara kunnu seta okkum aftur, og halda væl til standa.

Bjarni Olsen heldur, at ein rættiliga stórur vandi kann liggja í verandi støðu, nevniliga hetta at vit einki vilja gera við teir veruligu trupulleikarnar, sum eru í dag, út frá tí vón, at oljan loysir okkara trupulleikar.

-Fyri tað fyrsta hava vit onga trygd fyri, at nøkur olja er til, og harnæst gongur drúgv tíð, til landsbúskapurin fer at fáa nakran munagóðan ágóða frá virkseminum.

### Mugu ikki gloyma trupulleikarnir í fiskivinnuni

Bjarni Olsen sipar við hesum til, at vit gjarna skuldu havt okkara fiskarí og fiskivinnu til at virka so mikið væl, at hon gav eitt gott avkast til okkara samfelag, og at vinnan sum heild menti seg. Hann vísir í hesum sambandi eisini á tað arbeiðsloysi, sum er.

Uppá fyrispurning um orðaskiftið um og áhugin fyri oljuni drenar kreftir, sum áttu at verið brúktar til onnur aktuell mál sigur Bjarni Olsen, at tað sjálvandi er ein partur av málinum.

Men tað er eisini ein politiskur vandi í hesum, sum skal skiljast so, at vit í bakhøvdinum, og uttan at nakar leggur upp til tað, halda, at okkum nýtist ikki at fyrihalda okkum skilagott til viðurskiftini á øðrum økjum í samfelagnum, tí oljan skal nokk syrgja fyri, at alt gongur upp kortini.

Bjarni Olsen heldur, at tað átti at verið meiri búskaparligt orðaskifti á fleiri økjum, har tú kanska í dag hevur hug til ikki at taka tað so nógv fyri fult, tí tú hevur oljuna í bakhondini. Tað líkasum liggur í luftini, at tey búskaparligu mistøkini vit gera, tey skal oljan nokk klára.

Bjarni Olsen heldur tað tí vera bæði skeivt og vandamikið at byggja tann komandi politikkin í Føroyum uppá eina oljuinntøku, sum vit ikki vita verður tøk, og sum, um hon verður tøk ein dag, liggur langt frammi í tíðini.

### Vónin til olju kann fáa okkum at gloyma dagin í dag

*-Hevur tú varhugan av, at okkara politikarar eru við at gera tað?*

-Nei tað haldi eg ikki. Hinvegin fer neyvan nakar at góðtaka, at tað kortini verður gjørt.

Annars havi eg sjálvur varhugan av, uttan at eg tó hoyri fólk siga tað, at ein slíkur hugburður er við at stinga seg upp, har vónin til eina oljuvinnu líkasum ávirkar neyðturvilígheitina at hugsa búskaparliga skilagott.

*-Men er tað ikki gott, at fólk kunnu hava vónir til eina nýggja vinnu um nøkur ár, sum kann koma væl við hjá mongum í samfelagnum?*

-Tað er náttúrligt. Men sum eg havi sagt, so er hetta við eini oljuvinnu bæði sera langsiktað og óvíst. Tí er tað syndarligt, um tað skal forða okkum í at gera nakað skilagott annars á teimum økjum, sum vit í dag liva mitt í.

*-Men er tað ikki so, at longu í eini leitingartíð kann henda nýggja vinnan geva fitt av arbeiði av sær, sum so aftur kann merkjast í búskapinum?*

-Jú, tað er klárt. Men tað hevði verið gott um vit kundu fingið eitt realistiskt svar uppá, hvat støðið er í sjálvum leitingartíðarskeiðnum og í útbygging-


**Móttøka**



*Týsdagin 18. mars hevur*
*Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna*
*50 ára stovningardag.*
*Í hesum sambandi vilja vit fegin bjóða*
*viðskiftafólki og øðrum til*
*móttøku*
*á Hoyvíksvegi 72*
*týsdagin 18. mars millum kl. 14 og 18.*

*Vinarlig heilsan,*
***Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna***

**Epileptikarafelag Føroya**
**Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegi 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 13978 (Randfríð), ella tlf. 12048 (Lars).**

artíðarskeiðnum, og hvussu nógv hetta í veruleikanum gevur. Tosar tú við summi fólk, so gevur tað ótrúliga nógv og við onnur einki. Hvørjum skal tú trúgva?

Bjarni Olsen heldur, at oljuráðstevnan gav okkum eitt rættiliga neyvt svar uppá, hvussu langa tíð alt hetta tekur.

-Eg haldi tó ikki, at ráðstevnan gav okkum eina fatan av, antin tað er brúk fyri tveimum ella tveyhundrað elektrikarum og heldur ikki nær tað er brúk fyri teimum. Tann avkláringin hevði verið góð at fingið. Hon er so ikki komin við ráðstevnuni.

**Oljulóggávan**

*-Hvat hevur tú at siga um eina komandi oljulóggávu?*

-Hon leggur nakrar karmar, sum tú er lutvíst neyvt bundin at. Vit sleppa tó ikki undan henni, og vit noyðast at leggja okkum rímiliga fast, tó við tí undantaki, at tú kanst ongantíð leggja teg so fast, at um umstøðurnar broytast radikalt, so kann tað eisini tillagast. Tað mugu tí vera ávísir tillagingarmøguleikar í lógini, men samtíðis má ein vera greiður yvir, at tú kanst ikki bara lata alt flóta.

Men heldur Bjarni Olsen, at tað er ein røtt leið vit hava valt at seta í gongd leiting eftir olju?

Í hvussu er finnur tú ongantíð út av, um hon er har, um tú ikki leitar. Eg haldi eisini, at vit eiga at fara undir slíka leiting, men samtíðis eiga vit at gera okkum eina mynd av, hvørjar avleiðingar hetta hevur við sær. Tað kanst tú vera í ávísan mun um ikki fult út.

Bjarni Olsen heldur tað vera rættiliga týdningarmikið, at fólk fáa eina realistiska fatan av, hvør ávirkanin á samfelagið verður, sjálvt um ávirkanin ikki kemur fyrr enn um 10 ár. Tá hevur tú eina hóming av, hvat vit eru á veg út í, um tað verður til tað, sum lagt verður upp til í dag.

Kennir formaðurin í Búskaparáðnum seg tryggan við tey fólk, sum í løtuni eru við at tilrættaleggja lóggávu, skattaskipan o.l.

-Tað geri eg. Eg haldi, at fólkini í fyrisiting og nevnd eru sera kompetent. Men eg haldi vit sum eitt lítið samfelag standa yvirfyri nøkrum torførum avbjóðingum.

Vit eru m.a. so fáment og standa yvirfyri felagsskapum við sera nógvum starvsfólkum - við nógvari vitan og royndum. Tað er ein trupulleiki, sum reint prinsipielt ikki er so lættur at tackla. Vit skulu helst hava møguleika at kunna mobilisera eins nógva vitan sum tey vit skulu samráðast við, og hetta at stýra eini slíkari gongd krevur eina sterka fyrisiting.

**Eiga at gera okkum greitt hvat vit klára sjálvi**

Bjarni Olsen heldur tað vera sera umráðandi at gerast sannførdur um, antin vit megna hesa uppgávu ella ikki. Tí gera vit ikki tað, so eigur ein at gera tað, sum Oljuráðleggingarnevndin eisini hevur gjørt, nevniliga at keypa vitan uttanífrá. Sjálvandi skal ein ikki bara geva skarvin yvir, men at innsiggja, at ein ikki kann gera alt sjálvur haldi eg er sera týdningarmikið.

*-Politikkararnir tosa longu nú um, hvat vit skulu gera við oljuinntøkurnar, hvat heldur tú um tað?*

-Eg haldi ikki, at nakað er galið, at tú tekur tann tráðin upp, men eg eri tó samdur við teimum, sum siga, at hetta liggur longur frammi. Ístaðin fyri at tú nú leggur teg fast á eitt ella annað, so brúkar nøkur ár at gera seg klókari á hesum økinum. At gera eina lóg, sum bindur okkum til tað vit skulu gera um 10 ár, er eftir míni metan lítið skilagott.

Eins og vit skulu ansa eftir ikki at gloyma, at hetta er ikki nakað, sum er her og nú, men at tað fer at taka fleiri ár, áðrenn her verður nøkur verulig vinna, so heldur Bjarni Olsen, at vit heldur ikki eiga at koyrast upp í skúm um, at nú eru vit tikin á bóli.

---

**Skráseting Føroya**
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan

**Skrásetingar-nr.**
P/f 2100. **P/f Orgulverkstaðið, 100 Tórshavn**

**Viðtøkur broyttar:**
15.12.1996

**Nýtt navn:**
Sp/f Orgulverkstaðið

**Kapitalur:**
Hækking við
kr. 69.000,00 til
kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kr. 2.000,00 við skuldarumskifti til kurs 100 og kr. 67.000,00 við grunshækking

**Nevnd:**
Farin frá sum formaður: Carl Christian Kruse, Korkagøta 12, 100 Tórshavn
Innkomin sum formaður: Hjørdis Johansen, Korkagøta 12, 100 Tórshavn
Farin úr nevndini: Ebba Paulina Oluffa Restorff Johansen, Korkagøta 12, 100 Tórshavn
Innkomin í nevndina: Tór Verland Johansen, Tovsvej 13, 8230 Åbyhøj

**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Hjørdis Johansen, Korkagøta 12, 100 Tórshavn
Innkomin sum stjóri: Carl Christian Kruse, Korkagøta 12, 100 Tórshavn

**Tekningarreglur:**
Felagið verður teknað av einum stjóra, ella nevndarformanni

**Skráseting Føroya**
tann 12. mars 1997

**Kristin Balle**

---

# Grønlendingar í førum spenna seg út

Áki Bertholdsen

Síðani grønlendska stórfyritøkan, Royal Greenland settust niður í Føroyum hevur hon ment seg støðugt.

Hesi bæði árini hevur hon ment seg so nógv, at tey økja virksemið á skrivstovu síni í Havn við at seta eitt fólk afturat í starv.

Max Weyhe er nýggjur stjóri á skrivstovuni í Havn ístaðin fyri Arnhold Berg.

Afturat sær hevur hann eitt skrivstovufólk, Hansigne Dahl, sum er útflutningsteknikari.

Max Weyhe hevur arbeitt hjá Royal Greenland í 10 ár og áðrenn hann kom til Havnar, hevur hann verið á skrivstovu felagsins í USA.

**Seldi fyri 70 milliónir**

Royal Greenland í Føroyum flutti í fjør út fyri 70 milliónir krónur.

80 av fiskinum var roknaður til smásølu tvs, at hann var nógv virkaður.

M.a. fekk Royal Greenland ta størstu einstøku bíleggingina, nakað føroyskt roykivirkið hevur fingið, nevniliga fyri 15 milliónir í roykturn laksi, pakkað til smásølu í Týsklandi.

Men harumframt útflytir Royal Greenland eisini tosk, rækjur, kalva.

Føroyadeildin hjá Royal Greenland varð stovnað seint í 1994 fyri at fáa samband ímillum føroysk fiskavirki og Royal Greenland.

Endamálið var eisini at menna ymsar fiskavørur í samstarvi við fiskavirki og at flyta tær út.

– Vit eru sera væl nøgd við gongdina í Føroyum.

– Útflutningstølini vísa, at meting okkara var røtt, tá ið vit settust niður í Føroyum, sigur Sofia Geisler, pressutalsmaður hjá Royal Greenland.


GÓLVTÆNASTAN

*Alt innan gólv...*
*Ókeypis tilboð verða givin.*
*Vit ferðast um alt landið*

Skemmingsgøta 19 100 Tórshavn
Tlf. 18875 - 88875
Fax 18809


---

**Skráseting Føroya**
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan

**Skrásetingar-nr.**
P/f 2084. **P/f Gudrun, 700 Klaksvík**

**Viðtøkur broyttar:**
13.12.1996

**Nýtt navn:**
Sp/f Gudrun

**Nevnd:**
Farin frá sum formaður: Kristin Vilhelmsen, Bøgøta, 700 Klaksvík
Innkomin sum formaður: Marius Vilhelmsen, Hamarsníðið, 700 Klaksvík

**Tekningarreglur:**
Felagið verður teknað av stjóranum ella nevndarformanninum

**Skráseting Føroya**
tann 11. mars 1997

**Kristin Balle**

## Barnaringurin í Vestmanna útsølu

Í morgin, leygardagin kl. 15.00 hevur Barnaringurin í Vestmanna útsølu í missiónshúsinum.

Í Barnaringinum eru børn í aldrinum 10-13 ár, og hoyra tey serliga um missiónsarbeiðið hjá kirkjuni, sum verður gjørt í fremmandum londum.

Nú í vetur hava børnini virkað ymiskar gávulutir saman við teimum vaksnu. Hesir og aðrir lutir verða seldir í morgin seinnapartin. Peningurin, sum kemur inn, verður latin til ytri missiónsarbeiði, sum føroyingar gera saman við øðrum norðurlendskum ytrimissiónsfeløgum.


VIT GERA ALT
- MOTORARBEIÐI
- SVEISIARBEIÐI
- ALLAR SPROYTLAKERINGAR

VIT KOMA Á STAÐIÐ
- – at geva tilboð
- – at gera bátamotorarbeiði

PW VERKSTAÐUR
Tlf. 42043 alla 41950

SETEPLIR

Vit hava 5 ymisk sløg av set á goymslu

MBM
Kollafjørður
Bryggjan
Tlf. 21478

FÓÐUR
Tórshavn
Vegurin Langi
Tlf. 21300

AVGREIÐSLUTÍÐIR
Kollafjørður
Mánadag–fríggjadag
kl. 8.00–12.00 & kl. 13.00–17.30
Leygardag ........ kl. 09.00–12.00

Havn
Mánadag–fríggjad. kl. 8.00–17.30
Leygardag ......... kl. 11.00–13.00